# Hvør húsmóðir visti, hvat fór at henda við Jørgeni


- Løgmaður er ikki vanur at skunda sær. Tað tók honum ein heilan mánaða av avgreiða Jørgen Niclasen, sum hvør húsmóðir longu tíðliga í desember visti fór at fella, sigur Kjartan Joensen í Leirvík

**- Eg haldi, at løgmaður hevur alla ábyrgdina av tí, sum hendi í tinginum, tá ið Jørgen Niclasen umsíðir tók seg aftur sum landsstýrismaður, sigur Kjartan Joensen í Leirvík.**
**Kjartan væntar annars ikki, at hann verður nýggjur landsstýrismaður hjá Fólkaflokkinum**

POLITIKKUR
*Vilmund Jacobsen*

- Um nakar kann sigast at hava ábyrgdina av tí, sum hendi í tinginum í vikuni, so er tað løgmaður, Anfinn Kallsberg. Hann átti longu fyrstu dagarnar í desember at havt avgreitt málið um landsstýrismannin, tí eingin hevur meira enn løgmaður endurtikið, at jura og politikkur minni enn so altíð kunnu samansjóðast.

Tað er Kjartan Joensen í Leirvík, sum eigur hesi orðini.

- Tá ið úrslitið hjá kanningarstjóranum fyrilá, visti hvør húsmóðir, hvat fór at henda við Jørgeni, og tað átti løgmaður eisini at vitað.

- Løgtingið hevur sett eina landsstýrismálanevnd, sum hevur heimild í ivamálum at velja sær ein kanningarstjóra. Tí var tað púra burtur við og frekt av løgmanni aftaná, at úrslitið fyrilá, at fara út í býin at finna sær nakrar juristar, sum vildu koma til ta niðurstøðu, ið løgmaður vildi hava. Juristar gera jú tað, teir fáa pengar fyri, og sum oftast ber til hjá teimum at koma til ta niðurstøðu, sum nú einaferð er ynskilig, sigur Kjartan.

### Neyvan Kjartan

Spurdur, um tað kann hugsast, at hann verður eftirmaður Jørgens, nú sessurin sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum er ómannaður, sigur Kjartan, at tað roknar hann ikki við.

Kjartan hevur annars drúgvar royndir, bæði í fiskivinnuni á sjógvi og á landi, og hann hevur eisini gjørt sínar royndir í politikki.

- Eg vænti, tað fer at taka sína tíð hjá Fólkaflokkinum at velja nýggjan landsstýrismann, tí sum kunnugt, hevur løgmaður altíð góða tíð. Hann er jú ikki vanur at skunda sær, og tað tók honum jú ein heilan mánaða av avgreiða Jørgen, sigur Kjartan Joensen í Leirvík.

# Slepst ikki av við eitt einasta kilo av hýsu

**- Eg trúgvi ikki, at nakar keypir hýsu til framleiðslu í Føroyum í løtuni; tískil fer øll hýsan, sum verður landað í Føroyum, óvirkað av landinum, sigur Kjartan Joensen í Leirvík**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Á virkinum hjá Kjartani Joensen í Leirvík fara tey nú at virka smáan tosk til flak, tí marknaðurin fyri hýsufløkum er fullkomiliga mettaður í løtuni - Vit hava ikki verið til arbeiðis á virkinum síðan fyri jól og hava givið okkum góðar stundir, sigur Kjartan Joensen*

Á fiskavirkinum hjá Kjartani Joensen í Leirvík eru tey 30-35 fólkini ikki farin aftur til arbeiðis enn eftir, at fólkið fór í jólafrí.

- Vit hava burtur av virkað hýsu til flak, men hetta gongur ikki longur, tí tað slepst ikki av við eitt einasta kilo. Eg kenni ongan fiskaseljara í Føroyum, sum í løtuni sleppur av við eitt kilo av hýsuflaki. Vit hava tí givið okkum góðar stundir, áðrenn lagt verður til brots aftur. Ætlanin er at byrja aftur í komandi viku við framleiðslu av fløkum úr smáum toski, sigur Kjartan.

Meginparturin av hýsuni, sum virkið í Leirvík framleiðir, er seld til Bretlands og ein partur til USA, men í løtuni liggur virkið inni við nógvari hýsu á goymslu. Útboðið er nógv størri enn eftirspurningurin.

- Tað er ongantíð skilagott at liggja inni við ov stórari goymslu, sum bindir nógvan pening, men í løtuni er marknaðurin púrasta mettaður fyri hýsufløk, sigur hann.

### Kinverjar

Lesur tú norsk fiskivinnubløð, skilst, at ein tjóð, sum rættiliga hevur tikið upp kappingina við londini her um okkara leiðir, er Kina.

Kjartan veit ikki rættiliga at siga, um nøkur einføld orsøk er til, at marknaðurin fyri hýsufløkum í Bretlandi og USA er so vánaligur í løtuni, men hann heldur, at kinverjar eru við til at spreingja marknaðin.

- Kinverjar keypa frysta hýsu frá russum, sum verður virkað í fjareystri fyri minni pening enn her um okkara leiðir, og tað er torført hjá okkum, sum hava eitt dýrari framleiðslulið, at standa okkum í kappingini.

Hann heldur ikki, at onnur fjarskotin lond í sama mun sum Kina eru við til at trýsta hýsumarknaðin, tí hýsan, sum bretar keypa, verður í mestan mun fiskað í Norðuratlantshavinum og í Barentshavinum. Hann veit heldur ikki um onnur fiskasløg á marknaðinum, sum eru komin í staðin fyri hýsuna.

- Annars haldi eg ikki, at torføri marknaðurin hevur so nógv við prísin á fløkunum at gera. Tað er meira tað, at marknaðurin í løtuni totalt er mettaður í mun til útboðið, sigur Kjartan.

### Prísirnir

Hann vísir eisini á fallið í hýsuprísunum.

- Tað er ikki langt síðan, at hýsa, sum fór óvirkað av landinum, varð keypt á marknaðinum fyri einar 19, 17 og 12 krónur fyri kilo – alt eftir støddini. Nú liggja hesir prísir kanska á 9, 7 og 2 krónum ella minni fyri kilo, sigur Kjartan Joensen í Leirvík.




*Børnini í Miðstovu høvdu glett seg nógv til gestirnir komu*

Mylnuhúsið 4 ár:

# Barnatalið nærum tvífaldað


*Øll fingu kakao og bollar við bommum á. Astrid dámdi avbera væl hesar bollarnar*

**Dagstovnurin Mylnuhúsið fylti fýra ár hósdagin. Fleiri gestir komu á gátt á stovninum, sum byrjaði við 66 børnum í 1999. Í dag er barnatalið komið upp á 122**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Hanna Thøgersen er leiðari í Mylnuhúsinum. Hanna sigur, at stovnurin er vaksin avbera skjótt.

Børnini, sum eru í Mylnuhúsinum, eru frá vøggustovualdri og upp til átta ár. Á stovninum sjálvum, sum liggur uppi á Brekku, eru vøggustova og barnagarður. Útibarnagarðurin, Útistova, húsast úti í Grøv og frítíðarskúlin, Sornhúsið, í kjallaranum í hølunum hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag niðri við fótbóltsvøllin. Men bæði eru ein partur av Mylnuhúsinum, sum í fyrstuni hevði egnan bíðilista. Men í dag er ein og sami listi fyri allar stovnar og dagrøkt, sum verður umsitin av kommununi.

Frítíðarskúlin var tann parturin av stovninum, sum fekk vánaligastu undirtøkuna frá byrjan av, minnist Hanna. Hon sigur, at tað vóru einans tvey børn í skúlaaldri tá. Og tá húsaðust tey undir sama taki sum hini. Í dag eru tey omanfyri seksti í tali.

- Eg haldi, at vit nøkta tørvin á hesum økinum. Eg veit so í øllum førum ikki um, at nakar stendur á bíðilista til frítíðarskúlan, sigur Hanna.

Sum sagt, so helt stovnurin fýra ára dagin, hósdagin, har tey bjóðaðu systkjum og foreldrum til bollar og kakao, te og kaffi. Lagið var avbera gott, tá Sosialurin kom á gátt, og børnini søgdu, at tey høvdu glett seg til at fáa familjurnar á vitjan.

Uttanfyri veittraði Merkið í øllum regninum og vindinum, men inni var heitt og fjálgt at sita. Mylnuhúsið hevur ikki havt flaggstong fyrr, so hetta var fyrstu ferð, at tað varð flaggað fyri stovninum. Leiðarin sigur, at ætlanin er framyvir, at Merkið skal veittra hvørja ferð eitt barn á stovninum hevur føðingardag. Og við 122 børnum, so verða tað nógvir dagar, har Merkið fer at verða vundið á stong uttan fyri Mylnuhúsið.

### Bíðilistin minkar

Yvirhøvur er barnatalið í barnaansingarskipanini hjá Klaksvíkar kommunu vaksið sera nógv – og serliga seinasta árið. Hóast tað, so standa mong framvegis á bíðlista, men Sosialurin fréttir frá kommununi, at listin minkar spakuliga.

Jórun Niclasen, samskipari av barnaansingini, sigur, at tað standa umleið 70 børn á bíðilista í skrivandi stund. Tað er tað lægsta, hann hevur verið um hesa tíðina í fleiri ár. Hon sigur, at talið á børnum, sum eru komin á listan, síðani august, er áleið tað sama sum undanfarin ár.

Fyri framman liggur ein útbygging á útibarnagarðinum, Fjallafípan, úti í Grøv. Har kunnu væntast, at eini 15 børn sleppa inn afturat. Júst nær hesin verður liðugur, veit Jórun Niclasen ikki at siga.


*Rúni og øll hini í vøggustovuni hildu, at hetta hevði verið ein sera hugnaligur dagur*


*Beiggin hjá Nataliu, Símun, var yngsti gesturin í Mylnuhúsinum ta løtuna Sosialurin var á vitjan*


*Tóra var sera glað fyri bommini á bollunum, og hon vildi eisini sleppa at flagga fyri Mylnuhúsinum*